# Snälla Jenny

**Høvundur**: ***Alexander Ahndoril*** (uml. 2000).

**Leiksøga**: Leikurin er eitt familjudrama. Mann kann eisini siga eitt stovudrama millum eldru dóttrina Jenny, mammu hennara Ann-Marie og yngru dóttrina Sanja. Ann-Marie er lækni. Hon bleiv fráskild, tá yngra dótturin var pinkubarn. Jenny var tískil tann, sum bleiv álitið í familiuni. Sanja er læknalesandi. Hon og mamman eru tætt knýttar, meðan Jenny onkursvegna kennir seg at standa uttanfyri, tí hon er tann skilagóða.

Hesar tríggjar kvinnurnar hava ein fastan sið - tær hittast regluliga ein ávísan dag, drekka vín saman, skála fyri samanhaldinum í familjuni og práta og eru rættiliga bersøgnar við hvørja aðra. Allar hava sítt at dragast við, stórt sum smátt. Men tá tað kemur fram, at Sanja hevur bróstkrabba, fær henda lítla viðkvæma familjan nakað at standa saman um.

Hetta er ein rættiliga áhugaverdur leikur, stillur, ironiskur og spennandi.

**Pallmynd**: Snälla Jenny_gongur fyri seg heima hjá Jenny í fyrra parti og heima hjá mammuni Ann-Marie í øðrum parti.

**Leikarar**: Tríggir sera spennandi leiklutir.

- Jenny (35 ár)
- Sanja – systir (28 ár)
- Ann-Marie – mamma (55 ár)

**Leiktíð**: Uml. 2 tímar.

***Er skrásettur í MáF.***